# Spennandi fundur við oljufeløg

**Nú lítið og einki virksemi hevur verið á føroyska oljuøkinum í eina tíð fer komandi tíð tvørturímóti at bjóða uppá nógvar nýggjar avbjóðingar**

OLJUFUNDUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*


*Jarðfeingi hevur boðsent øllum oljufeløgum á fund 31. august*

Fríggjadagin 31. august verður rættiliga avgerandi fundur í Føroyum millum Jarðfeingi og umboð fyri øll oljufeløgini, sum eru virkin á landgrunninum. Tað er Jarðfeingi, sum hevur biðið um fundin í sambandi við 3. útbjóðingarumfarið, sum eftir ætlan verður latið upp seinni í ár. Á fundinum fara oljufeløgini at koma við sínum uppskotum og metingum av, hvørji øki tey kundu hugsað sær vórðu við í eini nýggjari útbjóðing.

Føroysku oljumyndugleikarnir halda tað eisini vera rætt at evaluera alla loyvisskipanina og treytirnar sum heild fyri oljuleiting við Føroyar. Tað eru nú umleið átta ár síðani, at fyrstu loyvini vórðu latin oljufeløgum at leita eftir olju á landgrunninum. Síðani tá eru boraðir fimm brunnar. Tann sætti verður boraður í heyst. Um somu tíð verður latið upp fyri tí triðja útbjóðingarumfarinum, og tað er í hesum sambandi, at bæði myndugleikar og oljufeløg vilja hava ein dialog um treytirnar. Sum Portalurin skilur støðuna, so vilja oljufeløg hava myndugleikarnar at gera onkrar av treytunum meira tíðarhóskandi og lagaligar ella liðiligar, eitt nú er talan um tann so nógv umrødda keikantin, har alt virksemi hjá oljufeløgunum skal fara um føroyskan keikant. Hetta hevur verið eitt ærum ófrávíkiligt krav frá føroyskum vinnulívi, og higartil hevur vinnu- og oljumálaráðharrin Bjarni Djurholm stuðlað hesum kravi. Nú fáa vit so at síggja, um fundurin tann 31. august fer at broyta nakað á hesum ella øðrum økjum.

### Hendingarrík tíð

Meðan lítið virksemi hevur verið á oljuøkinum í eina tíð bendir tó nógv á, at vit fara at fáa eitt heyst og ein vetur við nógvum virksemi. Seinast í hesum mánaðinum fer Chevron undir at skjóta seismikk í 008 loyvinum við markið og tætt við stóra oljufundið á Rosebankleiðini. Úrslitið av hesum kanningum kann gerast grundarlag undir avgerð at bora ein brunn í 2008 ella 2009. BP fyrireikar seg til at bora Williambrunnin inni á føroyska landgrunninum. Ætlandi verður sett á í oktober. Síðst í august verður stórt jarðfrøðilig ráðstevna hildin í Havn, og fyrst í september verður altjóða oljumessa í Aberdeen, har eisini fleiri føroysk virki luttaka. Móti ársenda verða so nýggj leitiloyvi latin á landgrunninum. Hyggja vit so inn í 2008, so verður fokus sett á eitt annað spennandi øki á landgrunninum. Tað er loyvið 005 hjá ENI og Føroya Kolvetni, sum hava gjørt av at bora ein brunn har í 2008 ella 2009. Talan er um Anne Marie brunnin, ið ávísir oljuserfrøðingar halda vera kanska ein tann mest áhugaverda boringin á føroyskum øki higartil, tí hon liggur so tætt upp at stórum oljufundum á bretska landgrunninum, eitt nú Cambo og Rosebank. Hetta var upprunaliga eitt níggju ára loyvi, sum seinni varð búnað til eitt loyvi við boriforpliktilsi.

Samanumtikið má sigast, at føroysk oljuleiting gongur eini spennandi tíð á møti við nógvum nýggjum avbjóðingum. Innan fyri eitt tíðarskeið uppá tvey ár fara vit helst at síggja tríggjar brunnar boraðar á landgrunninum við nøkrum av heimsins størstu oljufeløgum sum fyristøðufeløgum: tí bretska BP, tí italska ENI og tí amerikanska Chevron.

---


*Transocean Rather, boripallurin, sum fer at bora fyri BP í oktober*

# BP borar møguliga í oktober

**Tað gongur væl at bora hjá Transocean Rather hinumegin markið, og møguliga fær BP pallin at bora Williambrunnin á landgrunninum í oktober**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað hevur ljóðað, at BP fer ikki at bora Williambrunnin á landgrunninum fyrr enn í november. Eftir ætlanini skuldi boringin byrja í juli, men av tí, at boripallurin, sum bora skal Williambrunnin, verður brúktur til týðandi boriuppgávu hinumegin markið, og henda hevur verið seinkað, so hevur verið mett, at BP boringin fór at verða nógv seinkað. Nevnt hevur verið, at BP møguliga ikki fór at bora fyrr enn í næsta ár.

Sosialurin skilur nú, at BP, um alt gongur sum ætlað, fer at seta borin í undirgrundina í oktober. Hjarnar Djurhuus, stjóri hjá BP í Føroyum sigur, at teir hava eina vón um, at tað skal fara at bera til at byrja hesa spennandi boringina um einar tveir mánaðir. Hann leggur tó dent á, at gongur alt ikki sum ætlað hinumegin markið, so mugu teir brynja seg við toli til í november. Men ætlanin er so ikki at útseta nakra boring til í næsta ár.

BP hevur saman við Shell og Anadarko lagt nógva orku í at kunna fáa hesa boringina av bakkastokki í hesum árinum. Fundir hava verið við Jarðfeingi og við ymsar veitarar, og gongur tað eftir ætlan.